# Øki 6 Hallroyndir og Lættvektsuppgerðir

Hallroyndir og lættvektsuppgerður skulu gerast fyri hesi skip:

- Nýbygd ferðafólkaskip.
- Nýbygd farmaskip undir 500 BT.
- Nýbygd fiskiskip.
- Nýbygd vinnufør millum 15 og 24 metrar í longd.

Eisini skulu hallroyndir og lættvektsuppgerðir gerast sum nevnt niðanfyri:

- Skeiðbundið stabilitetseftirlit á ferðafólkaskipum 5. hvørt ár.
- Skeiðbundið stabilitetseftirlit á fiskiskipum 10. hvørt ár.
- Skeiðbundið stabilitetseftirlit á vinnuførum undir 15 metrar, bygd í 2001 ella seinni, 10. hvørt ár.
- Skeiðbundið stabilitetseftirlit á S- og V-skipum við ferðafólkaloyvi 5. hvørt ár. (Hetta eftirlit kann verða útsett í mesta lagi 5 ár treytað av, at skipið ikki er umbygt, og at stabilitetsmarginin er góð)
- Tá øll omanfyrinevndu skip verða umbygd.

## Lógargrundarlag

Fráboðan B frá Sjóvinnustýrinum, kapittul II-1, regla 5.

Fráboðan D frá Sjóvinnustýrinum, kapittul II-1 B, regla 18.

SOLAS-kunngerðin, kap. X

Fráboðan E og F frá Sjóvinnustýrinum, kapittul III, regla 9.

## Nærri vegleiðing er at finna t.d. í leiðbeiningunum hjá IMO fyri lættvektsuppgerðir, hallroyndir og stabilitetsútrokningar:

- Code on Intact Stability.
- Model Loading and Stability Manual.
- International Code for the Safe Carriage of Grain in Bulk.
- Guidelines for Damage Control Plans.
- Guidelines for Shipboard Loading and Stability Computer Program.

# Krøv til persónar, sum gera hallroyndir og lættvektsuppgerðir og gera stabilitetsbøkur:

Fyritøkan skal hava fólk í starvi, sum:

- Hevur verkfrøðingaútbúgving við skipabygging sum sergrein ella aðra viðkomandi útbúgving, og
- Hevur neyðugar royndir at gera hallroyndir og lættvektsuppgerðir og at gera stabilitetsbøkur, og at tryggja, at arbeiðið verður gjørt samsvarandi viðkomandi reglum og leiðbeiningum frá Sjóvinnustýrinum.

## Serligt um hallroyndir

Ein hallroynd skal gerast sambært leiðbeiningunum í Code on Intact Stability fyri skip yvir 24 metrar. Fyri skip styttri enn 24 metrar kann standardfrymilin hjá Sjóvinnustýrinum verða nýttur.

## Serligt um dynamometurroyndir

Í serligum førum loyva reglurnar fyri smærri før, at ein dynamometurroynd verður gjørd í staðin fyri hallroynd, tá eingin brúkilig uppmáting er av skrokkinum.

## Serligt um stabilitetsbøkur

Stabilitetsbók skal gerast fyri skip, sum eru fevnd av Fráboðan F hjá Sjóvinnustýrinum. Leiðbeiningarnar í Fráboðan F hjá Sjóvinnustýrinum skulu fylgjast.

Um skipið verður umbygt ella vektfordeilingin broytist, skal nýggj stabilitetsbók gerast.

Stabilitetsbókin skal so vítt gjørligt gerast sambært leiðbeiningunum í "Vejledning til autoriserede virksomheder i forbindelse med udfærdigelsen af stabilitetsbøger m.m. for fiskeskibe og mindre erhvervsfartøjer."

## Skjalfesting

Stabilitetsupplýsingarnar skulu gerast og góðkennast av fyritøku, sum er góðkendur undirveitari hjá Sjóvinnustýrinum. Avrit skal sendast Sjóvinnustýrinum í pdf.